# Halda fram við at nútímansgera ríkisfelagsskapin

**Á middegi týsdagin varð fólkatingið sett, og sum siður er, næm forsætismálaráðharri n, Anders Fogh Rasmussen, eisini við Føroyar í setanarrøðu síni**

FÓLKATINGIÐ

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Rigsfællesskabet mellem Danmark, Grønland og Færøerne er inde i et særdeles positivt forløb. En proces, hvor det færøske og det grønlandske folk i stadig højere grad selv får ansvaret for at udvikle deres samfund, segði Anders Fohg Rasmussen í endanum av setanarrøðu síni á Fólkatingi týsdagin.



Víðari segði hann, at landsstýrinini í Føroyum og í Grønlandi nú ríkisins vegna kunnu samráðast um at gera fólkarættarliga avtalur við statir og millumfólkaligar stovnar.

– Både Grønland og Færøerne har allerede benyttet den nye mulighed og har underskrevet aftaler med henholdsvis Norge og Island, segði hann.

Hann segði víðari, at Føroyar hava fingið hava fingið víttfevndar møguleikar at yvirtaka fleiri ábyrgdarøki.

– De færøske myndigheder beslutter selv tempo og omfang. Og for Grønland ser regeringen frem til resultaterne af arbejdet i den grønlandsk-danske selvstyrekommission om at udvide Grønlands selvstyre inden for Rigsfællesskabet, segði forsætismálaráðharrin, sum endaði hendan partin av røðuni við hesi niðurstøðu:

– Så arbejdet med at forny og modernisere Rigsfællesskabet fortsætter.

*Anders Fogh Rasmussen heldur setanarrøðuna á fólkatingi á middegi týsdagin. Í formansstólinum sæst afturvaldi fólkatingsformaðurin, Christian Mejdahl. Svend Auken setti aftur í ár Fólkatingið sum ellisformaður – í Danmark er tað tann, ið hevur sitið longst á tingi, sum setur tingið. Svend Auken hevur sitið á fólkatingi síðani 1971*

*Mynd: Jens Nørgaard Larsen/Scanpix 2005*

# Yvir 20 prosent fleiri persónbilar



**Sølan av nýggjum persónbilum er vaksin við 21,5 prosentum fyrstu níggju mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið í fjør. Samlaða sølan av nýggjum akførum er vaksin við 14,5 prosentum**

BILHAGTØL

Í yvirlitinum hjá Bileftirlitinum sæst, at sølan av nýggjum persónbilum fyrstu níggju mánaðirnar í ár er vaksin við 21,4 prosentum í mun til í fjør. Frá januar til og við september í fjør vórðu seldir 853 nýggir persónbilar í mun til 1036 í ár.

Sølan av vøruvognum og lastbilum er so gott sum tann sama sum í fjør. Ein nýggjur kampingvognur er seldur í ár í mun til fimm í fjør.

Samlaða sølan av nýggjum akførum er vaksin við 14,5 prosentm í mun til í fjør. Afturat hesum eru higartil í ár skrásett 309 nýggj prutl samanborið við 164 nýggj prutl sama tíðarskeið í fjør.




United Seafood og Faroe Seafood løgdu saman fyrr í ár, og samanlagda felagið hevur eitt tað størsta KT-kervið í Føroyum. Øll virkini og allar deildirnar uttanlanda eru á sama neti, og røkkur hetta netið til í alt tíggju deildir, líka úr Vestmanna til Boulogne sur Mer í Fraklandi. Samanlagt eru yvir 100 brúkarar á netinum, og harumframt koma ymiskir terminalar og stýringar av Marel MPS skipanini. Alt hetta verður stýrt av høvuðsdeildini í Tórshavn, og ofta er eisini møguleiki at fara út á deildirnar at arbeiða. Brúkararnir á teldukervinum eru væl fyri á telduøkinum, og arbeiðsumhvørvið er sera positivt og dynamiskt.

STARVIÐ
- Dagligt support/brúkarahjálp har vanligir spurningar og trupulleikar hjá brúkarum verða loystir.
- Dagligur rakstur av og eftirlit við EDV-skipanunum.
- Tillaging og gerð av útskriftum og skermmyndum.
- Uppsetan og viðlíkahald av egin-teldunum o.ø. útbúnaði.
- Uppsetan og innkoyring av nýggjum EDV-skipanum.

UMSØKJARIN
Útbúgving sum t.d. Datamatikari ella IT-supportari, ella royndir innan KT sum geva samsvarandi førleika. Kunnleiki til Axapta, Netware, Groupwise ella Marel MPS er eisini ein fyrimunur. Góð samstarvsevni og førleika fyri at leggja egið arbeiði til rættis. Koyrikort er eisini eitt krav.

Vit kunnu bjóða eitt starv í mennandi og spennandi fakligum umhvørvi við møguleika fyri víðari menning á skeiðum o.l. Lønin verður avtalað eftir kvalifikatiónum.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Ynskja tit at fáa meir at vita um starvið, so kunnu tit seta tykkum í samband við Hans Blaasvær ella fara inn á heimasíðurnar www.united.fo ella www.faroe.com. Umsóknarfreistin er 17. oktober, og umsóknir skulu sendast til:

FAROE SEAFOOD

Faroe Seafood : Postsmoga 218 : 110 Tórshavn : att: Hans Blaasvær, KT-samskipari
Tel: 35 55 55 : Fax: 35 55 50 : E-mail: hans@united.fo